HEIMARØKTIN
Sigmundargøta 5 · Tlf. 317240 · Fax 319238
100 Tórshavn

## Heimarøktin/Suðuroy sjúkrasystrar

**Heimasjúkrasystrastarv til øki 5.**

Søkt verður eftir heimasjúkrasystir at arbeiða í skiftandi vaktum frá 1. september 2000 ella eftir nærri avtalu, 24 tímar um vikuna.

Lønar og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jeannu í Lágabø, økisleiðara, tlf. 373907.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til: Almanna- og heilsumálastýrið, Starvsfólkadeildin, Eirargarður 2, FO-100 Tórshavn.

Umsóknarfreist 15. juli 2000, kl. 14.00.

## Lærarar

Søkt verður eftir tveimum lærarum til Hvalbiar Skúla skúlaárið 2000/2001. Eitt fulltíðar starv og eitt 25 tímar.

Størvini eru tíðaravmarkað. Lønt verður samb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkum 18.1 til 27.4.

Umsóknir til størvini skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 7/7-00.

**Hvalbiar Skúlanevnd**
v/ Conny Poulsen · FO-850 Hvalba

TVØROYRAR KOMMUNA

## Innskriving

### av børnum í nýggja frítíðarskúlan á Tvøroyri

Sagt verður við hesum frá, at innskriving av børnum í nýggja frítíðarskúlan kann fráboðast kommunuskrivstovuni skrivliga ella munnliga frá 1. juli.

**Tvøroyrar kommuna**

## Alari

Søkt verður eftir røskum manni at byrja á alistøð okkara í føstum arbeiði.

Tað er ein fortreyt at kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Ring ella skriva til:

**P/f Alistøðin á Bakka**
FO-625 Glyvrar
Tlf. 447485

## Landssjúkrahúsið
FO-100 Tórshavn

## 1 sjúkrasystir til psykiatriska Deild 3

Á Deild 3 er eitt starv sum sjúkrasystir á fullari tíð í blandaðum vaktum leyst at søkja til setan pr. 1 september 2000 til 31. desember 2000.

Deildin er ein opin deild við 14 seingjarplássum fyri varandi psykiskt sjúkar sjúklingar, sum hava tørv fyri langtíðarviðgerð, men sum eru komnir yvir akuttu støðuna. Deildin er tvørfakliga samansett av sjúkrasystrum, pleygarum, sosial- og sunnheitsassistentum og læknum. Arbeitt verður saman við ergoterapeutum, fysioterapeutum, sálarfrøðingi eins og við avvarðandi sosialu skipanini.

Arbeitt hevur verið miðvíst í eitt ár eftir umhvørvisliga terapiháttinum, har tað individuella sjónarmiðið skal náast við kontaktpersónsskipanini. Hesin nýinnførdi arbeiðsháttur krevur nógv av bæði sjúklingum og starvsfólki og er tí sera mennandi, bæði persónliga og fakliga.

Tann, sum fær starvið, kemur at virka saman við positivum og virknum starvsfólkum í eini deild, sum er í menning, har øll hjálpa og stuðla hvørjum øðrum. Í deildini er supervisión við sálarfrøðingi eina ferð um vikuna.

Okkum tørvar, at tú:
- hevur hug til og evni at menna tað, sum vit eru í gongd við
- hevur yvirlit og kannst arbeiða sjálvstøðugt
- sært avbjóðingarnar heldur enn avmarkingar
- hevur góð samstarvsevni.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Gunnvá Wardum, virkandi deildarsjúkrasystir á tlf. 313540 lokal 423 ella Marin Vang, sjúkrarøktarstjóra, lokal 266.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknarfreistin er 24. juli 2000 kl. 14.00.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

## Stólar

### 30 stólar bíliga til sølu

MARCO POLO
Sverrisgøta 12 • 100 Tórshavn
Tel. 313430 • Fax 313220
www.marcopolo.fo

Sosialurin - 311820

## UMBERING frá Havnar Sjúkrakassa

**Til teir limir, sum hava stovnað gjaldingarloyvir í peningastovnunum:**
Vegna tekniskar trupulleikar hjá Sjúkrakassanum, er peningur fyri limagjald ikki farin av kontoini hjá einum parti av limunum.
**Brekið verður rættað innan 17. juli 2000.**

Vit biðja limirnar um umbering fyri ampan av hesum.

Havnar SJÚKRAKASSI
**Havnar Sjúkrakassi**

## Útbjóðing

### Dagstovnur í Vesturbýnum

Fyri Tórshavnar Kommunu verður arbeiðið, at byggja nýggjan dagstovn í vesturbýnum boðið út alment í hesar fakarbeiðstøkur:

nr. 01 Jørð-kloakk og lendisarbeiði
nr. 02 Betongarbeiði
nr. 03 Timburarbeiði
nr. 04 Snikkaraarbeiði
nr. 05 Múraraarbeiði
nr. 06 Hitaverk og sanitet
nr. 07 El-arbeiði
nr. 08 Málaraarbeiði
nr. 09 Gólvlegging

Útbjóðingartilfarið skal verða umbiðið í seinasta lagi mánadagin **3. juli 2000** og fæst frá hesum degi, móti kr. 1.000,00 í veð við krossaðum kekki við at venda sær til teknistovuna hjá Albert Isfeld & Gudmund S. Hansen.

Boð skulu saman við útbjóðingartilfarinum latast inn á teknistovuna hjá ALBERT ISFELD & GUDMUND S. HANSEN, arkitektar A. F. sp/f, Lucas Debesargøta 11, Tórshavn í afturlatnum brævbjálva merktur

»Dagstovnur í vesturbýnum,
tilboð og nr. á arbeiðstøku«

í seinasta lagi mánadagin **24. juli 2000 kl. 16.00.**

Boðini verða tá latin upp og kunnu teir bjóðandi vera hjástaddir.

**ALBERT ISFELD & GUDMUND S. HANSEN, arkitektar A.F. sp/f**
Lucas Debesargøta 11 · Boks 70
110 Tórshavn · Tlf. 313696 · Fax 316488

## Tannrøktari

Søkt verður eftir einum tannrøktara til tannlæknastovuna í Klaksvík 20–30 tímar um vikuna. Løn eftir avtalu. Skrivlig umsókn við avriti av próvnum og møguligum viðmælum verður at senda til

**Tannlæknastovuna**
v/ Sólvá Eystberg
Kráargøta 14 · 700 Klaksvík
Tlf. 456555 · eftir kl. 17 tlf. 457655



## Sethús í Havn til sølu



Um hóskandi boð fæst selja vit sethúsini á Heygsmannavegi 9. Húsini eru í 2 hæddum og bygd í 1967. Áhugað kunnu venda sær til

**Advokatskrivstovuna**
**Fr. Petersensgøta 9**

Halgir Winther Poulsen, adv. Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**

*Lýsið í* **sosialinum**

## TILBOÐ ÚT AV HÚSINUM

## EM-búffur

*v/ bakaðum epli og tilhoyri*

Einans 98,-

MARCO POLO
Sverrisgøta 12 • 100 Tórshavn
Tel. 313430 • Fax 313220
www.marcopolo.fo

Sosialurin - 311820

## Lærupláss

Vit hava brúk fyri einum lærlingi til rørsmíð at byrja beinanvegin.

Ert tú nærlagdur og hevur koyrikort, skuldi tú komið inn á gólvið og tosa við okkum sum skjótast.

Hógv framleiðir ketlar, arbeiðir við at selja og seta upp hitaverk, ventilatión, sanitet, umframt mangt annað.

**Hógv Handilsvirki**
660 Søldarfjørður · Tlf. 441963

## SKEIÐ

### Windows NT SERVER/MS PROXY

***24.-25. juli***
**Superbrúkari í Windows NT Server**

**2 dagar**

***Skeiðhaldari:***
***Rógvi Knudsen*** frá Microsoft í Svøríki.

Kostnaður kr. 4.000,- fyri báðar dagarnar

***26. juli***
**Superbrúkari í MS Proxy**

**1 dagur**

***Skeiðhaldari:***
***Rógvi Knudsen*** frá Microsoft í Svøríki.

Kostnaður kr. 2.000,-



*SKOTARÓK 14*
*100 TÓRSHAVN*
*TLF. 211861 og 311414*
*FAX 317534*

fd-06-00

SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

***-altíð eitt skeið til tín tørv***

http://kvasir.farodane.fo kvasir@farodane.fo

# Varmakelduskrá 2000



***Fríggjadagin 30. juni***

| | |
|---|---|
| 19.00–20.00 | Málningaframsýning í fimleikarhøllini verður sett av Hallbjørg Hansen. Danmarks Radio Pigekor luttekur |
| 19.00 | ÍF 2. deild–NSÍ 1. deild, steypadystur |
| 19.00 | Sjavskapping í kantinuni í Ítróttarhøllini á Kambsdali |
| 19.30 | Varmakelduteitið verður framført í Arbeiðsmannafelagshúsunum. Atgongumerki kunnu bíleggjast á tlf. 444401 |
| 20.00 | Tivoli letur upp |
| 20.00 | Konsert í fimleikarhøllini v/ Håkan Hagegård (baryton) og Elisabeth Bostrøm (klaver) |

***Leygardagin 1. juli***

| | |
|---|---|
| 13.30 | Skrúðgonga frá ítróttarhøllini oman til Bókasavnið |
| 14.00 | Dánjal Vang setur Varmakeldustevnuna við Bókasavnið og Fuglafjarðar Hornorkestur spælir |
| 15.00 | »Bergliðið« –»ÍF 1. deild 1979 liðið«, steypadystur |
| 15.00 | Tivoli, mattombola og hoppiborg lata upp |
| 16.00–20.00 | Málningaframsýning í fimleikarhøllini |
| 16.00–20.00 | Fornminnisfelagið hevur framsýning í Piddasa handli av myndum og amboðum. Høvi verður at keypa drýl við føroyskum viðskera |
| 17.00 | 1000 ára haldið. Framsýningin hjá J. P. Gregoriussen av gomlu kirkjutekningunum letur upp í kjallaranum í býráðshúsunum. Manskórið syngur |
| 17.00 | Brotssparkskapping fyri vaksin og børn á fótbóltsvøllinum |
| 19.00 | Konsert og undirhald á Kambsdali við Kulum Rótum Trølla-Pætur vitjar |
| 20.00 | Varmakelduteitið verður framført í Arbeiðsmannafelagshúsinum. Atgongumerki kunnu bíleggjast á tlf. 444401 |
| 22.00 | Opið hús í Siloa |
| 23.00 | Midnáttarsamkoman úti á Varmakeldu. Signar á Brúnni heldur røðu |
| 23.00 | Dansur í høllini á Kambsdali. ARIA spælir |
| 23.00 | Dansur verður í Arbeiðsmannafelagshúsinum. Kallar spæla |
| 24.00 | Opið hús í Thabor |

***Sunnudagin 2. juli***

| | |
|---|---|
| 11.00 | Gudstænasta í Fuglafjarðar kirkju v/ Una Næs. Undir gudstænastuni syngur Danmarks Radio Pigekor |
| 11.00 | Møti í Siloa |
| 14.00 | Fólkafundur við Bóksavnið. Dávur Winther heldur røðu og Fuglafjarðar Hornorkestur spælir |
| 15.00 | Tivoli og hoppiborg letur upp |
| 16.00 | Bingo verður í høllini á Kambsdali |
| 16.00–20.00 | Málningaframsýning í fimleikarhøllini |
| 16.00 | Konsert í Fuglafjarðar kirkju v/ Danmarks Radio Pigekor |
| 17.00 | 1000 ára haldið. Framsýningin hjá J. P. Gregoriussen av gomlu kirkjutekningunum |
| 18.00 | Møti í Thabor |
| 18.00 | Møti í Siloa |
| 23.30 | Felagssangur við Bókasavnið og lutaseðlar verða drignir. Siloa kórið luttekur við sangi |
| 23.30 | Dansur í Arbeiðsmannafelagshúsinum. Kallar spæla |

***Mánadagin 3. juli***

| | |
|---|---|
| 19.00–21.00 | 1000 ára haldið. Framsýning hjá J. P. Gregoriussen av gomlu kirkjutekningunum |
| 20.00 | Varmakelduteitið verður framført í Arbeiðsmannafelagshúsinum. Atgongumerki kunnu bíleggjast á tlf. 444401 |

***Týsdagin 4. juli***

| | |
|---|---|
| 19.00–21.00 | 1000 ára haldið. Framsýning hjá J. P. Gregoriussen av gomlu kirkjutekningunum |